Álit

í

løgtingsmáli nr. 18/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum (Framskundað stigvíst virðisgjald fyri ravmagnsbilar og vetnisbilar)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 29. september 2023, og eftir 1. viðgerð 5. oktober 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. og 9. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við felags umboð fyri bilasølur P/F Reyni Service, P/F Auto Service, Bilasølan Sp/f, Sp/f Berg Motors, P/F Waag, Sp/f Norðbil, Sp/f Komfortbilar, P/F Wenzel og Sp/f Bilrøkt, landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, landsstýrismannin í fiskivinnu- og umhvørvismálum, Dennis Holm, saman við Akstovuni, og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið um at seta eitt ovara mark fyri avgjaldsfrítøku av orkuvinarligum akførum er komið frá landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum eftir umrøðu av hesum í Løgtinginum í samband við løgtingsmál nr. 40/2022.

Sambært uppskotinum verður ásett, at ravmagns- og vetnisbilar frá 1. januar 2024 skulu rinda eitt virðisgjald av tí partinum av CIF-virðinum, sum fer upp um kr. 200.000.

Sambært galdandi lóggávu eru allir persónbilar, sum nýta ravmagn ella vetni til framdrift, avgjaldsfríir til og við 31. desember 2024. Frá 1. januar 2025 skulu hesi akfør rinda eitt stigvíst hækkandi avgjald. Í 2028 og fylgjandi ár er avgjaldið 30% av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 100.000 og 45% av avgjaldsskylduga virðinum omanfyri kr. 100.000.

Hetta uppskotið er tí ein framskunding og øking av stigvísa virðisgjaldinum fyri ravmagns- og vetnisbilar við CIF-virði omanfyri kr. 200.000.

Hevur ein bilur til dømis eitt CIF-virði á kr. 300.000 skal virðisgjald ikki rindast av teimum fyrstu kr. 200.000, meðan virðisgjald skal rindast av teimum seinastu kr. 100.000. Í nevnda dømi verður hetta avgjaldið kr. 45.000.

Avleiðingin av hesum er, at tess dýrari bilurin er, minni verður avgjaldsfrítøkan, lutfalsliga.

Undir viðgerðini er komið fram, at nógv akfør verða ávirkaði av hesari broyting, tá flestu orkuvinarligu akførini í dag hava eitt CIF-virði á omanfyri kr. 200.000, tó at ávirkanin er munandi minni fyri bíligaru akførini og størri fyri sonevnd marglætisakfør.

Undir viðgerðini er upplýst nevndini, at allir bilar, sum fáa loyvi til at koyra á vegunum í Føroyum, verða mettir nóg tryggir til endamálið.

Eftir viðgerðina í nevndini verður mett, at hetta uppskotið er í tráð við veðurlagspolitikkin, tá talan framvegis verður um ávísa frítøku fyri avgjøld fyri øll orkuvinarlig akfør, tó at frítøkan minkar nakað.

Frítøka fyri avgjøld á orkuvinarlig akfør varð viðgjørd í vár, og tær broytingarnar vórðu settar í gildi frá 1. september fyri í ávísan mun at taka hædd fyri longu gjørdum avtalum og veitingartíðum á umrøddu bilunum.

Spurningurin um gjørdar avtalur og veitingartíðir hevur eisini verið viðgjørdur í samband við hetta uppskotið, og nevndin er samd um, at tað kann vera óheppið, at hetta loft fyri avgjaldsfrítøku verður sett í gildi longu frá 1. januar 2024, nú komið er út í november. Nevndin metir eina hóskandi freist at vera 1. apríl 2024, eisini hóast veitingartíðirnar í nøkrum førum kunnu vera sera drúgvar.

Mett verður í hesum sambandi, at tað kann ávirka keypsmynstrið, at ein dagfesting verður sett á, og verður freistin longri enn til 1. apríl 2024 kann hugsast, at hetta keypsmynstur verður ávirkað enn meira, tó at tað sambært Fíggjarmálaráðnum er torført at seta upphædd á, hvussu hetta ávirkar.

Í sambandi við viðgerðina hevur somuleiðis verið umrøtt, um tað hevði verið rætt at havt eitt hámark, ið er hægri enn kr. 200.000. Tó at tað er torført at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av hesum, verður mett, at tað hevur eina lutfalsliga stóra eyka afturbering av gjøldum við sær, um markið verður hækkað.

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður í § 3, stk. 3, nr. 1 aftan á “2024” sett: “, frá og við 1. apríl,”.

Viðmerkingar til broytingaruppskotið:
Við hesum broytingaruppskoti verður hámarkið fyri virðisgjaldsfrítøku fyri ravmagns- og vetnisakfør uppá kr. 200.000 í CIF-virði ikki galdandi fyri tey av hesum akførum, ið eru skrásett áðrenn 1. apríl 2024.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 21. november 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	